# E - og tónleikurin



**Niels Uni Dam, tónleikari og útvarpsvertur**

*Kemur tú úr einum heimi við ljóðføri?*
- Ja, vit høvdu eitt orgul og eina munnharpu ella tvær, men eingin spældi veruliga upp á tær — á, jú vit áttu eisini nakrar blokkfloytur.

*Spælir tú nakað ljóðføri?*
- Nei, eg spældi blokkfloytu eina stutta tíð, men havi gloymt alt.

*Syngur tú undir brúsuni?*
- Ofta.

*Hevur tú nakrantíð droymt um at gerast tónleikari?*
- Ja, ofta. Serliga droymdi eg um at blíva keyboardspælari, eg haldi tað vera eitt stuttligt ljóðføri, men eg havi ikki tol til at læra meg at spæla.

*Hvat hevur tónleikur at siga fyri teg?*
- Eg veit ikki - nógv. Tónleikur hevur ymist at siga í ymiskum samanhangum, tónleikur er ein partur av mínum lívi.

*Hvussu nógvar fløgur/plátur/bond eigur tú?*
- Millum 500 og 600.

*Hvat er tín yndisfløga?*
- Eg havi onga yndisfløgu, men nakrar dámar mær øðiliga væl. Eg kann nevna: Beck: »Odelay, Beck: »Midnight Vultures «, Leonard Cohen: »Ten new songs«, Black Sabbath: »Vol. 4«, Sort Sol: »Unspoiled Monsters«. Av føroyskum fløgum dámar mær best: Eivør Pállsdóttir, Hanus G. Johansen: »Gaman og álvara« og MC-Hár: »Framvegis uttan vit«.

*Hvørja fløgu hevði tú ikki viljað átt, um tú so fekst pengar afturfyri?*
- Hvussu nógvar pengar? Eg dugi at síggja kultvirðið í flest øllum, tí vil eg fegin eiga alt.
*Hvør sangur skuldi ongantíð verið skrivaður?*
- »Tað finst bert tann eini« — vemmiligur helvitiskapur.

*Hvat er tann pínligasta plátan, sum tú eigur?*
- Eg eigi onga pínliga plátu.

*Hvønn sang hevði tú valt, um tú skuldi sungið karaoke?*
- »West End Girls« hjá Pet Shop Boys - nydeligur poppur

*Hvat er tann besti tónleikurin til eitt hugnaligt kvøld?*
- Leonard Cohen kanska.

Hvønn tónleik vilt tú helst hoyra sunnumorgun?
- Tað veldst um, um eg eri á veg í song ella á veg upp.

*Hvør tónleikur fær teg í ringt lag?*
- Soul.

*Hvør sangur kann fáa teg út á dansigólvið?*
- Eingin.

*Hvat er tann fyrsti sangurin, sum tú minnist teg dáma?*
- »Tað var ein lítil genta« hjá Vanju ella »Money Money Money« hjá Abba — tað var um sama mundið.

*Hvønn sang ert tú fegnast um at hava verið við til at gjørt ella spælt inn?*
- »Sangurin um orð tøl og tos«. Eg síggi hann, sum ein tann besta føroyska sangin nakrantíð.

*Hvør sangur skal spælast til tína jarðarferð?*
- »Burn in hell« hjá Twisted Sister. Nei tvætl, okkurt pent. Kanska Eivør kundi sungið »Á kundi á tíðarhavi«.

*Hvat er tann besta konsertin, sum tú hevur verið til?*
- Tær eru nógvar, men Black Sabbath í Roskilde 1998, Queensryche á Monsters of Rock 1991, Beck í Roskilde 1997, Garbage Roskilde 1998, Blur Roskilde 2000 og Nick Cave Roskilde 2001 eru helst tær bestu.

*Hvønn tónleikara hevði tú viljað hitt?*
- Teir eru nógvir, men helst Ozzy Osbourne.

whazzzup!!!

Forrige Næste Svar Svar alle Videresend Flag Udskriv Rediger Slet Ombryd igen Udkast

**TELDUBRÆVIÐ**

Frá: Chanette á Lofti, Svøríki, chanettelofti@hotmail.com
Til: turid@sosialurin.fo
Evni: Vikuskifti

## »Og vinnarin er.........?«

Tónleikaprísir, filmprísir, sjónvarpsprísir, reklamuprísir, ítróttarprísir og so framvegis. Ja, tað er næstan á hvørjum ári, at tað kemur onkur nýggjur prísur, har tær ymisku branchurnar heiðra tær bestu prestatiónirnar gjørgnum tað seinasta árið. Oscar, Robert og Bodil eru bert nakrir av teimum kendu filmprísunum, Emmy og Grammy eru sjónvarps- og tónleikaprísir, og seinast eru tað eisini komnar fleiri ítróttarpríshandanir.

Svenska ítróttargallan við luttøku av allari svensku kongafamiljuni hevur verið eitt afturvendandi tiltak tey seinastu árini, og største heiðurin er at vinna prísin sum ársins ítróttarfólk. Svenskarar hava eisini havt mangar ítróttarstjørnur gjøgnum tíðina, og teir hava nógv at vera stoltir av. Hvør kennir ikki Bjørn Borg og Stefan Edberg frá tennis, Ingmar Stenmark frá skíítróttini og tað svenska íshockey landsliðið, sum hevur vunnið alt frá OL-gulli til verðinsmeistaraheitið í fleiri ár. Eisini innanfyri svimjing, frælsan ítrótt, ríðing, golf, hondbólt og fótbólt blanda svenskarar seg millum heimsins bestu ítróttarfólk.

Men tað er kanska ikki so løgið alíkavæl. Tá veturin kemur, so gongur hvør smápiltur runt við fullari íshockeyútgerð, og teir frystu innsjógvarnir eru fullir av ungum íshockeyspælarum og teirra pápum við dreymum um eina professionella framtíð. Og tá ið sjógvarnir eru tiðnaðir, so verður spælt inni í íshøllum ella bara vanligt hockey á spæliplássinum.

Tað er einki at ivast í, at tær mongu ítróttarstjørnurnar virka sum fyrimyndir hjá teimum ungu ítróttarfólkunum og eru við til at tryggja eitt støðugt høgt støði innan ítróttin. Tað hava eisini danskarar seinast lagt til merkis eftir, at tann stóra framgongdin hjá kvinnuliga hondbóltslandsliðnum hevur virkað til, at fleiri ung hava meldað seg sum hondbóltspælarar.

Men alt hetta kemur ikki av ongum, tað merkist, at alt tað svenska samfelagið er innstillað uppá at geva góðar umstøður og pláss fyri ítróttarfólkunum. Ríðiskúlin, har dóttir okkara gongur, fungerar til dømis eisini sum ítróttarstudentaskúli. Tað vil siga, at teir næmingar, sum ganga á tí nærliggjandi studentaskúlanum, kunnu velja ríðing sum linjufak, og fáa so undurvísing í tí á ríðiskúlanum. Samstundis ger ein fleksibul ordningur í undirvísingini á studentaskúlum tað gjørligt hjá toppítróttarfólki at trena og samstundis fáa studentsprógv.

Nógv verður eisini gjørt fyri børnini heilt niður í forskúlaaldur. Umframt tað vanliga breiða úrvalið av ítróttargreinum, so skipar Malmö Fritidsforvaltning fyri serligum tiltøkum í skúlaferiunum. Í summarferiuni, heystferiuni og vetrarferiuni — ella sportlovet, sum vetrarferian eitur í Svøríki — fáa børnini eitt tredivu síðu langt programm yvir ítróttartiltøk við heim, sum tey kunnu meldast til í skúlaferiuni. Programmið sjálvt líkist mest sum einari farvuríkari reisubrochuru, meðan innihaldið er ítrivs- og ítróttartilboð líka frá teatir, kunst, ríðing, sigling, skoyting og so framvegis. Munurin er bara, at her fáa børnini møguleika at ganga til eitt ítriv allan dagin í eina, tvær ella kanska tríggjar vikur, alt eftir, hvat boðið verður. Børnini fáa soleiðis ríkan møguleika at gera annað enn bert at vera á skúlafrítíðarorningini í skúlaferiunum, um foreldrini arbeiða. Samstundis er hetta eisini ein møguleiki hjá børnunum til dømis at royna ymiskar ítróttargreinar, og vita hvørja grein tey vilja halda fram við at íðka.

Og í síðsta enda er alt hetta arbeiðið innan ítróttin við til at skapa nýggjar vinnarar, sum fara út og umboða Svøríki á besta hátt runt í verðini, sum til dømis Kajsa Bergquist, sum er núverandi verðinsmeistari í hæddarlopi.

# ítróttur

Nr. 47 • leygardagur • 4. mars 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Spentur borgarstjóri

**Fuglafjørður hevur seinnu árini ment seg til ein av ítróttardeplunum í landinum, og um vikuskiftið kann væl vera, at borgarstjórin fær úr at gera**

FUGLAFJØRÐUR
*Jákup Mørk*



*- Sjálvur giti eg í øllum førum, at hetta eisini kann viðvirka til at økja um áhugan og dirvið hjá øðrum ítróttum, soleiðis at hesi dríva enn meira á, heldur Sigurð Simonsen um góðu úrslitini, sum ÍF hevur havt í flogbóltinum*

Hóast hann ikki telist millum tey allar ídnastu av teimum, sum fylgja við í ítróttinum, so kann væl vera, at ítróttarvikuskiftið, sum nú stendur fyri framman, fer at verða eitt av teimum heilt strævnu hjá borgarstjóranum í Fuglafirði, Sigurð S. Simonsen.

Tað er nevnliga nógv, sum talar fyri, at talan verður um eitt av teimum helt hendingaríku vikuskiftinum fyri ítróttina í Fuglafirði.

Tað einasta, sum frammanundan er heilt víst, er, at Fimleikafelagið Flog verður karmur um rútmisku stórkappingina, sum í ár verður hildin á Kambsdali, og har er Sigurð so biðin um at vera tann, sum skal halda setunarrøðuna.

Hartil kemur so eisini, at tað væl kundi hent seg, at bæði kvinnur og menn koma til bygdina við vissuni um gullmerki, eftir at tey sunnudagin hava verið á Vágoynni til flogbóltsdyst.

Hjá monnunum hevur ÍF i alt ár sýnt seg sum sterkasta liðið, og tó at munurin niður til tey næstu nú er minkaður nakað nógv, so kunnuleir framvegis avgera alt sjálvir, og um teir vinna í Sørvági, so er meistaraheitið heima eitt umfar undan kappingarársloki.

Tað kann tað eisini verða hjá kvinnunum, men tær hava eitt sindur øðrvísi fortreytir. Men tað er ikki óhugsandi, at kappingarneytarnir úr Mjølni missa, tá tær vitja á Tvøroyri, og um so er, so kann ÍF við einum sigri tryggja sær gullið.

Tá prátið fellur inn á hetta, er skilligt, at tað er ein spentur borgarstjóri, sum nú fyrireikar seg til vikuskiftið.

- Nú eri eg ikki tann, sum fylgir allar best við og hyggi at øllum dystum, men tað sigur seg sjálvt, at eg eri spentur. Fyrst og fremst er tað sjálvandi fimleikastevnan, sum eg skal fyrireika meg til, men hitt er eisini øgiliga spennandi. Ikki tí. Eg havi so avgjørt ikki kannað mær nakran bita. Har skal bert ein kiksari til, áðrenn vit kunnu standa við ongum, men sum støðan er nú, so sær tað gott út.

Spurdur, hvørt hann saman við býráðnum fer at fyrireika nakað, um alt skuldi lagað sum best, er hann skjótur at svara, at tað má hann helst.

- Vit høvdu eina samkomu niðri á Muntra, tá menninir vunnu steypafinaluna, har vit øll fingu ein bita at eta, umframt at ein gáva eisini varð latin liðnum. Og tað kann væl verða, at vit noyðast at gera okkurt líknandi sunnudagin, men lat okkum nú fyrst bíða eftir úrslitunum, heldur hann.

## Aktiv kommuna

Seinnu árini hevur tað annars verið alt meira vanligt, at Fuglafjørður hevur verið frammarliga, tá talan er um ítrótt. Og Sigurð heldur eisini, at kommunan hevur verið ein aktivur leikari í hesi framgongdini.

- Vit hava í øllum førum eftir førimuni roynt at skapt karmarnar fyri hesum. Og eg haldi eisini, at hetta hevur givið úrslit. Í dag er ítróttalívið her hjá okkum somikið ríkt, at trupulleikar eru at fáa nøkrandi hølisumstøður til øll. Fimleikur, badminton og flgobóltur eru alt vetrarítróttagreinar. Tað eru borgarar í øllum aldrum sum íðka, so hóast plássið ikki altíð er so gott, so er hetta avgjørt at fegnast um.

- Og ikki minst kennist tað deiligt, nú tað eisini gongur somikið væl, sum tað eitt nú ger hjá flogbóltinum. Sjálvur giti eg í øllum førum, at hetta eisini kann viðvirka til at økja um áhugan og dirvið hjá øðrum ítróttum, soleiðis at hesi dríva enn meira á. Beint í áðni gekk eg mær til dømis fram við fótbóltsvøllinum, og har varð nógv lagt fyri, so vit mugu vóna, at tað eisini fer at geva úrslit.

- Og lat meg so at enda leggja afturat, at júst hetta við flogbóltinum er ein ítrótt, sum tiltalar meg sera nógv. Tað tykist í øllum førum, sum um tað her er munandi lættari hjá smærru økjunum í landinum at standa seg. Kravið um tal av leikarum er ikki eins stórt, sum tað er í fleiri øðrum ítróttagreinum, og at síggja eitt nú TB, Dráttur og ÍF standa ovarliga á sigursskamlinum kann bara vaksa um áhugan hjá øðrum, so eg ivist ikki í, at flogbólturin framhaldandi fer at verða í stórari menning kring alt landið, sigur borgarstjórin at enda, áðrenn leiðin aftur gongur heim til røðuna, sum skal haldast leygardagin.